# Fyrsta tensing-konsertin í Norðurlandahúsinum



Føroyska tensing-kórið smæddist ikki burtur á konsertini mánakvøldið. Við góðum sangrøddum og tónleiki afturvið gjørdu tey sít til at áhoyrararnir fingu eina ógloymandi løtu

**Mánakvøldið var merkt av tann-áringum í Norðurlanda-húsinum, tá 60 føroyskir og norskir tann-sangarar sungu tensing-sangir so tað rungaði í**

TENSINGKÓR
*Snorri Brend*

Hesa seinastu vikuna hevur føroyska tensing-kórið »Sound of Glory» havt vitjan av tveimum norskum kórum.

Kórið, sum dagliga hevur heimstað sín í KFUM í Havn, skipaði tí fyri serstakari tensing-konsert í Norðurlandahúsinum mánakvøldið við eini sera fjølbroyttari skrá.

Hetta var samstundis fyrsta tensing-konsertin í Norðurlandahúsinum nakrantíð, og tí eisini fyrstu ferð at ikki færri enn trý tensingkór hava konsert samstundis.

Hesir 60 sangararnir hava verið á venjingarlegu á Sandi í farnu viku, og nú skuldi so spyrjast, hvat tey høvdu fingið burtur úr hesar dagarnar.

Úrslitið kundi ein nærum fullsett konserthøll verða vitni til: Her var bæði drama, dansur, sangur og tónleikur og fleiri onnur innsløg, sum øll vórðu sera væl móttikin av tí unga og eisini meiri tilkomna áhoyraraskaranum í Norðurlandahúsinum.

Frálíkur sangur, góðir solistar og framúr góðir føroyskir og norskir tónleikarar gjørdu hesa løtuna ógloymandi.

Takk fyri, tit ungu. Og haldi endiliga á!



*Drama og dansur var eisini á skránni. Og líkt varð til, at hetta dámdu teimum ungu áhoyrarunum og sangarunum sera væl*



*Íalt 60 sangarar vóru á konsertini. Her syngja teir føroysku og norsku sangfuglarnir fleiri sangir saman – bæði á norskum og føroyskum máli! Ikkje verst ...'*